

*Mynd: Jesn Kr. Vang*

# Við sjeymílaferð in

**Nývaldu tingkvinnurnar fara avgjørt at stuðla hvørjari aðrari í tingarbeiðinum, og tær ivast ikki í, at tað fer at eyðkenna tingarbeiðið, at tær rúgva meira upp.**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Látur og klemm eyðkenna tær sjey nývaldu kvinnurnar hendan kalda mánamorgun vit hava sett teimum stevnu til prát og myndatøku í forhøllini í tinghúsinum. Hetta er fyrstu ferð tær hittast eftir valgið leygardagin.

– Hetta er nokk til ein heilan bindiklubb, flennir Katrin Dahl Jakobsen, sum eisini er sera fegin um at heilsa uppá Marjus Rein, tingskrivara, sum hon sjálvandi kennir frá undanfarnum tingsetum.

Og ongin ivi er um, at tingið veruliga hevur fingið kvinnurnar á vitjan. Bergtóra H. Joensen hevur lítlu Karina við. Skúlin ringdi, tí gentan var últsalig. So fyrsti arbeiðsdagur byrjar væl við sjúkum barni. Og, sum øllum kunnugt er Annita á Fríðriksmørk við barn, og fer í farloyvi fyrsta dagin.

## Kvinnubólkur

Spurdar, í hvønn mun tær kunnu fáa gagn av hvørji aðrari, siga allar við ein munn, at tað fáa tær heilt vist. Og tær greiða frá, at nakrar longu hava prátað um møguleikan at arbeiða tvørturum floksmørk og at leggja fram viðkomandi uppskot, sum allar eru samdar um.

– Hetta skal ikki misskiljast soleiðis, at vit ikki kunnu vera ósamdar politiskt. Sjálvandi kunnu vit tað, men vit halda samstundis at tað hevur týdning, at vit gera okkurt tvørtur um floksmørkini, sigur 42 ára gamla Bjørt Samuelsen, sum er millum tær fýra nývaldu kvinnurnar.

Tær sjey rokna eisini við, at tær fara at stovna ein kvinnubólk, har tær kunnu samstarva. Hetta er vanligt í øðrum londum, har kvinnuligir parlamentarikarar viðhvørt seta sína egnu kvinnupolitisku dagsskrá.

– Tað fer avgjørt at merkjast, at vit eru so nógvar. Sjey gera stóran mun, sigur Katrin Dahl Jakobsen, 56 ár, sum hevur drúgvar royndir sum tingkvinna frá árunum 1998-2004. Og 32 ára gamla nývalda Annika Olsen, býráðslimur í Havn, vísir á, at har hava tær havt ein góðan kvinnubólk í nógv ár.

Ein onnur av teimum royndu kvinnunum er 39 ára gamla Annita á Fríðriksmørk. Hon roknar við, at politiskt fer tað at síggjast serliga væl aftur í fíggjarlógarviðgerðini, at so nógvar kvinnur nú taka sæti á tingi.

– Tá vit hava verið so fáar, er tað so nógv lættari at strika játtanir, sum raka kvinnurnar, til dømis barnsburðargrunnin, í mun til eitt nú sjómannafrádráttin. Ikki bara í tinginum sum heild, men eisini innanhýsis í flokkunum, sigur hon.

## Javnstøða gevur dynamikk

36 ára gamla Bergtóra Høgnadóttir Joensen er eisini millum tær nývaldu. Í borgarliga starvi sínum hevur hon arbeitt nógv við starvsfólkaviðurskiftum, eitt nú sum HR-mennari í Eik banka. Hon heldur, at javnvág millum kvinnur og menn er ein fyrimunur fyri eitt arbeiðspláss.

– Tað hevur avgjørt stóran týdning fyri dynamikkin, arbeiðslagið, málburðin og atburðin, at bæði kyn eru umboðað á einum arbeiðsplássi.

Og júst hetta við málburði og atburði er nakað, sum tær allar hava eina greiða hugsan um.

– Tað er ongin ivi um, at vit fara at síggja nógv minni til niðrandi málburðin, har tingfólk gera gjøldur og leypa framav í heilum. Kvinnur tosa ikki soleiðis,